# Leiðari til Dagstovn í Sørvági

Sørvágs Kommuna søkir eftir leiðara til Dagstovn í Sørvágs, sum letur upp ½ august 2006.

Stovnurin er í 6 eindum, settur saman av vøggu-, barnagarðstovu og frítíðarskúla.

**Vit bjóða**
Eitt áhugavert starv í einum umhvørvi tætt við náttúru, har tú fært møguleika fyri at seta tín dám á stovnin.

Seta starvsfólk og annars vera við í øllum tí, sum skal til fyri, at stovnurin skal virka eftir ætlan.

Møguleiki er fyri ráðgeving og eftirútbúgving.

**Vit ynskja at umsøkjarin**
- er útbúgvin pedagogur
- hevur leiðsluroyndir innan økið
- kann arbeiða sjálvstøðugt, taka avgerðir og geva greið boð
- er tilreiðar at fara virkin inn í, og sum ein partur av starvsfólkabólkinum
- hevur hugsjónir, tá ið tað snýr seg um virksemi í einum barnagarði
- saman við starvsfólkunum er við til at menna tað pedagogiska arbeiði
- hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan dag, merktan av virðing fyri børnum, foreldrum og starvsfeløgum
- kann virka í góðum samstarvi við starvsfelagar og foreldur
- er opin, positivur og duga væl at samskifta, bæði innan- og uttanhýsis
- hevur teldukunnleika

**Setanarviðurskifti**
Talan er um eitt fulltíðarstarv. Løn og setanarviðurskifti eru sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala arbeiðsgevarafelagið.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Jákup Suna Lauritsen, borgarstjóra, tlf. 210504.

Umsóknir saman við upplýsingum um útbúgving, royndir og møguligum viðmælum skulu vera Sørvágs Kommunu, í hendi í seinasta lagi 20. februar 2006. Viðmerk á umsóknina »Leiðari«.

Kommunan skilir sær rætt til, um ikki nógvar umsóknir eru at lýsa av nýggjum.

**Sørvágs kommuna**

# SKANNING AV SEYÐI

Teir bóndir, ið ætla at fosturskannað seyðin í vetur, kunnu ringja til Eyðstein Jensen á telefon 510195 ella við at senda teldupost til eyj@e-finance.fo.

Besta úrslitið fæst um skannað verður áðrenn 100 dagar eftir at brundseyðurin er útfarin. Fyri betur at kunna tilrættaleggja skanningina verður heitt á bøndur um at siga frá innan 20. feb.

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Sjúkrarøktar-frøðingar til B6

Á **B6** er eitt avloysarastarv fyri sjúkrarøktarfrøðingin í barnsburðarfarloyvi, í skiftandi vaktum, á brøk 0,9 leyst at søkja frá 15. mars ella eftir avtalu til og við 31. oktober 2006.

Deildin tekur ímóti innkallaðum og akuttum sjúklingum, hevur 15 seingjarpláss og hesar sergreinar:
- gastroenerologi
- neurologi
- endokrinologi
- onkologi
- hæmatologi

Arbeitt verður eftir kontaktpersónsskipanini.

**Krøv til umsøkjaran:**
- prógv og góðkenning sum sjúkrarøktarfrøðingur
- fakligan áhuga innan medisinsku sjúkrarøktina
- góð samstarvsevni

**Vit kunnu bjóða:**
- eitt dynamiskt og fjølbroytt arbeiðsumhvørvi
- fakliga kompetentar og virknar starvsfelagar
- positivt tvørfakligt samarbeiði
- ávirkan á fakliga menning
- góða innleiðslu

Vegna umvælingar á B6, B7 og B8 í ár verður deildin afturlatin uml. 8 vikur. Røktarstarvsfólk verða tí flutt á aðra deild hetta tíðarskeiðið.

**Nærri fæst at vita** um starvið við at ringja til Ingun Gaardbo, deildarleiðara, lokal 6006 ella til Ásu Poulsen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, lokal 6102 ella e-post asap@lsh.fo

Løn og setanartreytir smb. sáttmálan millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

Umsóknarfreistin er 1. mars 2006 kl. 12.00.
Tað er umsøjkarans ábyrgd, at umsóknin er á starvsfólkadeildini, áðrenn freistin er úti.

Skrivlig umsókn í brævbjálva merktur "umsókn til starv" við CV, autorisatión, avrit av prógvum, skjølum o.l. skal sendast til:

**Landssjúkrahúsið**
Lønar- og starvsfólkadeildin
att. Una Dalsgaard
FO-100 Tórshavn

*Á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum www.lsh.fo sæst meira um størv við at klikkja á leinkjuna "starvsfólk"*

# Norðoya Javnaðarfelag

Aðalfundur felagsins verður hóskvøldið 2. mars. Skrá sambært lógum felagsins. Nærri verður lýst seinni.

**Nevndin**

**Landssjúkrahúsið**
Fo 100 Tórshavn

# Summarferiu-avloysarar 2006

**Sjúkrarøktarfrøðingar**
**Pleygarar**
**Heilsurøktarar**
**Radiografar**
**Ljósmøður**

Søkt verður eftir starvsfólki til fulltíðar og parttíðar feriuavloysarastørv í skiftandi vaktum á Landssjúkrahúsinum í summarferiutíðarskeiðinum 1. juni til og við 31. august 2006.

**Økini, ið tørva summarferiuavloysarar í ár, eru:**
- hæmadialysu ambulatorium
- kardiologiskt ambulatorium
- hjartadeild
- barnadeild
- føðideild/prematurstova og ljósmøðraskipanin
- geriatri/rehabiliteringsdeild
- intensiv deild, viðrakning og skaðastova
- operatiónsdeild (við tilkallivakt frá bústaði/kamari)
- kirurgisk seingjadeild
- psykiatriskar seingjadeildir
- røntgendeildin (við tilkallivakt frá bústaði/kamar) radiografur/røntgensjúkrarøktarfrøðingur
- narkosudeildin (við tilkallivakt frá bústaði/kamar).

**Vit ynskja** ágrýtin røktarfólk við minst tvey ára praksisroyndum við dirvi, góðum samstarvsevnum og evnum til at virka sjálvstøðugt.

**Nærri upplýsingar** fáast við at venda sær ávikavist til hesi á telefon 304500:
- Cecilia Vestureið, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, skurðdepilin, lokal 5102, ceci@lsh.fo
- Ása Poulsen, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, Medicinski depilin, lokal 6102, asap@lsh.fo
- Bergit Weihe, leiðandi sjúkrarøktarfrøðing, Psyk. depilin, lokal 4102, bergitw@lsh.fo
- Ragna S. Reinert, deildarleiðari á Røntgendeildini, lokal 5507, rtragna@lsh.fo
- Landssjúkrahúsið heimasíða: www.lsh.fo

**Umsóknarfreistin** er 13. mars 2006.

**Løn- og setanartreytir** samb. sáttmála millum avvarðandi yrkisfelag og Fíggjarmálaráðið.

**Skrivlig umsókn** við CV, avriti av prógvum v.m. skal sendast til:

**Landssjúkrahúsið**
Lønar- og starvsfólkadeildin
FO-100 Tórshavn

# Frá Parkinsonfelagnum

Ársaðalfundurin verður í MBF húsinum

**leygardagin 11.mars 2006 kl 1500**

Skrá sambært lógum felagsins

**Nevndin**